

***Trúarfrælsi.*** *Skal krossurin av Kristusi sleppa at hanga í almennum fólkaskúlum? Nei, sigur evropeiski mannarættindadómstólurin í Strasbourg, tí missionerandi tiltøk hoyra ikki heima í almenna undirvísingarverkinum.*

MYND: ISTOCK

Danskir politikarar bæði í stjórnini og í andstøðuni undrast á dómin. Frá SF til Dansk Folkeparti verður spurt, í hvønn mun ein meinaleysur krossur ger seg inn á trúarfrælsið hjá næmingum og foreldrum. Hann hongur jú bara har!

Og somu støðu hevur okkara egni uttanríkisráðharri, Jørgen Niclasen, givið til kennar í lesarabrævi.

## Dómurin er viðkomandi

Bæði danskir og aðrir útlendskir løgfrøðiligir serfrøðingar eru á einum máli um, at dómurin var væntandi og er eitt natúrligt framhald av eini kendari linju hjá mannarættindadómstólinum í Strasbourg. Ein linja, sum sigur, at átrúnaður ikki hoyrir heima í almenna undirvísingarverkinum, og at statir skulu tryggja eina uttanveltaða almenna skúlaskipan uttan missionerandi tiltøk. Trúarfrælsi er við øðrum orðum eins nógv rætturin til at sleppa undan átrúnaði sum rætturin til at geva sín átrúnað til kennar, tí trúarfrælsi umfatar eisini ikkireligiøsar borgarar.

– Dómstólurin hevur leingi verið eyðkendur av teirri fatan, at trúarfrælsið best verður tryggjað, um undirvísingarverkið og aðrir almennir stovnar virða meginregluna um átrúnaðarligan neutralitet. Hetta merkir ikki bara eitt forboð ímóti átrúnaðarligum symbolum, men eisini ímóti átrúnaðarligum halgisiðum og prædikan, sigur Jens Elo Rytter, professari í religiónsrætti á Københavns Universitet.

– Eg hevði verið sjokkeraður, um dómstólurin ikki hevði tikið hesa støðuna, tí dómstólurin hevur áður bannað muslimskum turrikløðum í skúlum bæði í Sveits og í Turkalandi, sigur Jens Elo Rytter.

Professarin í religiónsrætti er ikki í iva um, at dómurin er viðkomandi fyri Danmark. Tí hóast Danmark hevur eina offisiella statsreligión mótvegis Italia, so er dómurin orðaður í generellum vendingum og tykist tí vera galdandi fyri øll londini, sum hava undirskrivað evropeiska mannarættindasáttmálan.

– Hóast Danmark hevur eina almenna statskirkju og gevur kristindóminum sersømdir í grundlógini, so bendir einki á, at dómstólurin skuldi komið til annað úrslit, um danski staturin stóð á ákærubeinkinum, heldur danski professarin. Tað eru nevniliga mørk fyri, hvussu aktivt staturin kann agera til frama fyri eina ávísa religión, eisini statir við eini statsreligión.

Ein annar professari, sum hevur blandað seg í almenna kjakið um dómin, er Henrik Palmer Olsen. Hann heldur, at Danmark eins væl og øll hini limalondini eiga at taka dómin til eftirtektar og seta spurningin, um tey politiskt eru samd við mannarættindadómstólin í Strasbourg.

– Dómurin strammar kravið um átrúnaðarligan neutralitet í almennum fólkaskúlum og ger greitt, at skúlin skal hava eina fakliga distansu til alt átrúnaðarligt innihald, skrivar Henrik Palmer Olsen í eini kronikk í Kristeligt Dagblad.

> Dómurin strammar kravið um átrúnaðarligan neutralitet í almennum fólkaskúlum og ger greitt, at skúlin skal hava eina fakliga distansu til alt átrúnaðarligt innihald

Spurningurin er so, um átrúnaðarligu siðirnir í føroyska fólkaskúlanum sampakka við støðuna hjá evropeiska mannarættindadómstólinum. Tað kann ein sak millum Italia og Strasbourg ikki staðfesta. Men politiska mótstøðan ímóti dóminum er kortini ein ábending um eina grundleggjandi ósemju millum evropeisku londini um, hvussu trúarfrælsið í roynd og veru skal tulkast og umsitast.